# ÚTBJÓÐING

## RØKTARHEIM Í NORÐSTREYMI

Fyri »Kommunufelagsskapin í Sundalagnum« verður arbeiðið viðv. grovplanering til nýtt røktarheim í Streymnesi boðið út alment.

Arbeiðið fevnir um grovplanering og spreinging.

Roknað er við, at arbeiðið skal verða liðugt til fyrst í apríl 2004 (fyri páskir).

Útbjóðingartilfarið kann verða umbiðið nú og fæst frá mánadegi 9. februar 2004 móti kr. 5.000,00 í veð við krossaðum kekki, við at venda sær til teknistovuna hjá Albert Isfeld & Gudmund S. Hansen, arkitektar A.F.

Boð skulu saman við útbjóðingartilfarinum latast inn á teknistovuna hjá Albert Isfeld & Gudmund S. Hansen, arkitektar A.F., Lucas Debesargøta 11, Tórshavn, í afturlatnum brævbjálva merktur:

**RØKTARHEIM Í NORÐSTREYMI**
Tilboð og arbeiðstøka

í seinasta lagi mánadagin **16. februar 2004 kl. 16.00.**
Boðini verða tá latin upp og kunnu teir bjóðandi vera hjástaddir.

---

**ALBERT ISFELD & GUDMUND S. HANSEN, arkitektar**
Lucas Debesargøta 11, 100 Tórshavn

**LANDSBYGGIFELAGIÐ, ráðgevandi verkfrøðingar**
Landavegur 5, 100 Tórshavn

**VERI-CON, ráðgevandi verkfrøðingar**
Maritugøta 8, 188 Hoyvík

**MARTIN E. LEO, ráðgevandi verkfrøðingur**
Tórsgøta 24, 100 Tórshavn

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Vøggustovan og barnagarðurin við Velbastaðvegin**

Á stovninum ganga 101 børn.

Stovnurin er skipaður við trimum barnagarðsstovum við 20 børnum í hvørjari og fýra vøggustovum við 10 børnum í hvørjari. 1. januar í ár varð stovnurin kommunalur og lagdur undir ein leiðara. Fyri framman liggja útbýggingar og nýtímansgerð av stovninum, soleiðis at arbeiðsumstøðurnar bæði fyri børn og starvsfólk verða munandi betur. Tá stovnurin er liðugt umbygdur summarið 2005, er ætlanin at hava forskúlastovu, og barnatalið lækkar í barnagarðstovunum niður í 18.
Frá 1. mars 2004 verður stovnurin skipaður við einum leiðslutoymi við einum leiðara og tveimum varaleiðarum, har tíð er sett av til leiðslu hjá báðum varaleiðarunum. Tann, ið settur verður, kemur at hava sítt dagliga yrki á vøggustovuni.

Stovnurin er 30 ár og liggur sera væl fyri við stórum og fjøltáttaðum spæliplássi og stutt er burtur í haga, oman í Sandá og fjøru.

www.torshavn.fo

## Varaleiðari til vøggustovuna og barnagarðin við Velbastaðvegin

Tórshavnar kommuna søkir eftir varaleiðara 40 tímar um vikuna til barnagarðin og vøggustovuna við Velbastaðvegin at byrja 1. mars 2004.

**Vit bjóða**
- eitt áhugavert starv, har tú fært møguleika til at seta tín dám á stovnin
- ávirkan á leiðslubygnaðin
- møguleika fyri ráðgeving
- møguleika fyri eftirútbúgving

**Vit ynskja at tú**
- ert útbúgvin pedagogur
- kanst arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir
- tekur tær av tí dagliga umsitingarliga arbeiðinum í samstarvi við leiðaran, samstundis skalt tú vera eldhugað/ur fyri tí pedagogiska arbeiðinum við børnunum
- hevur holla ástøðiliga vitan
- saman við starvsfólkunum er við til at menna tað pedagogiska arbeiðið
- at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag merktan av virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum
- kanst virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og foreldur
- dugir væl at samskifta, bæði innan- og uttanhýsis
- sært møguleikar framum forðingar
- hevur kunnleika til KT-tøkni

**Setanarviðurskifti**
Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Monu R. Mohr, leiðara, og Ingilín Berg, varaleiðara, tlf. 31 43 73.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera vøggustovuni og barnagarðinum við Velbastaðvegin, Velbastaðvegur 41, 100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 20. februar 2004.


BILSKROKK




**Lakkering & Plátuverkstaður**

Vit hjálpa fólki við bilskaðum/ tryggingarskaðum, lakkering, buglum, rusti og mangt annað.

Ring til okkum og fá eitt gott tilboð.

**- Tlf. 32 24 71 -**

Slættanesgøta 9 - boks 2227 - Fo-110 Tórshavn





**Besta barrservice í Føroyum**

Vit átaka okkum at standa fyri barrini og at skonkja til allar veitslur og samkomur. Okkara sera rutineraðu barrgentur duga líka væl at blanda ein Green Betty sum at skonkja ein fatøl. Vit ráðgeva fegin hvørji vín ella ølsløg eru hóskandi til matin og hvørji sløg skulu verða í barrini og so hava vit kappingarførar prísar og eina total service sum tryggjar at veitslan verður væleydnað.

Ringið til Anniku á tel 51 48 47 og fáið eitt óbindandi prát.

YERTSHÚSIÐ






# Kunngerð

## frá útskiftingarnevndini í Kunoy

Útskiftingin innangarðs av Kunoyar bygd varð endað við úrskurði sagdur á fundi í Kunoy 28. januar 2004. Hesin úrskurður varð latin til ákæru frá sama degi sbrt. kap. 9 í útskiftingarlógini frá 27. mars 1939.

Møguligar kærur skulu vera skrivligar og stílast til Yvirútskiftingarnevndina, Sorinskrivarin, C. Pløyensgøta 1, Tórshavn. Kærufreistin er 3 mánaðir frá 28. januar 2004.

Á sama fundi varð metingin av kommunalu ognartøkuni latin til ákæru sbrt. § 4 í ognartøkulógini frá 07.05.1881. Kærufreistin er 3 mánaðir frá 28. januar 2004 at rokna.

Útskiftingarskjølini og metingin liggja frammi hjá kommununi í Kunoy og á Matrikulstovuni í Tórshavn, til kærufreistin er úti.

Víst verður eisini til heimasíðuna hjá Matrikulstovuni: www.matrikul.fo

N. v.
**Øssur Á. Midjord**
**útsk. form.**

Føroya Keypssamtøka í Vágum

## *Avloysari til skrivstovuna*

Søkt verður eftir avloysara til skrivstovuna at byrja 1. mars 2004 til 1. jan. 2005

**Arbeiðið** umfatar vanligt skrivstovuarbeiði og telefonsamskifti millum kundar og handil

**Arbeiðstíð**: Uml. 20 – 25 tímar um vikuna

**Okkara krøv**: Fyrikomandi, kundavinarlig/ur, røkin og góð samstarvsevni, umsøkjari við próvskjølum ella royndum innan økið, hevur fyrimun.

**Løn**: Sambært S&K sáttmálanum

**Umsóknin** skal vera skrivlig og sendast FK-Vágum saman við avriti av próvtøkuskjølum, viðmælum v.m., í seinasta lagi 16. feb. 2004, mrkt. *avloysari.*

Aðrar upplýsingar fáast við at ringja tlf. 332950/221130, *Ingi Joensen*

**Keypssamtøkan**
**í Vágum**
**370 Miðvági**

Gøtu Kommuna

**Gøtu kommuna søkir eftir einum**

# Dagrøktara

at byrja skjótast til ber.

Dagrøktarheimið skal vera innrættað barnavinarliga, har rúm er til børnini at spæla í og hóskandi, trygt spælioki uttanfyri.

Í skipanini eru tríggir dagrøktarar, tveir í Syðrugøtu og ein í Norðragøtu. Vit hava skipað eina spælistovu, har dagrøktarar saman við børnunum og leiðaranum koma saman til ymiskt ein dag um vikuna, fríggjadag frá kl. 7.30 til kl. 17.15.

Lønin er sambært sáttmála við Føroya Kommunala arbeiðsgevarafelagið.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Torgerð Hansen, tlf. 442012 lokal 10.

Skrivlig umsókn skal sendast okkum áðrenn hósdagin 12. februar 2004.
Bygdarráðið tekur sær rætt til frítt at velja millum umsóknirnar ella onga at taka.

**Dagstovnurin í Gøtu**
Boks 32
511 Gøtugjógv

# Pedagogur

## til Frítíðarskúlan í Fuglafirði

Frítíðarskúlin í Fuglafirði søkir eftir 1. pedagogi 30 t. viku at byrja 1. mars 2004.

Frítíðarskúlin er ætlaður 52 børnum úr 1. og 2. flokki.

Lønin verður sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið. Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Jógvan Philbrow leiðara á tlf. 227385 ella 444355.

Umsóknir saman við avritum av prógvum og viðmælum skulu vera býráðsskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 20. februar 2004, kl. 10.00.

Fuglafjarðar býráð
Norður í Gerði 10b
FO-530 Fuglafjørður

Býráðið skilir sær rætt til at velja millum innkomnu umsóknirnar ella onga at taka.

Fuglafjørður, 20. januar 2004
**Fuglafjarðar býráð**

veitst tú ikki tað?

# Barnaheimið søkir eftir avloysarum

Barnaheimið søkir við hesum eftir avloysarum fyri starvsfólk, sum fara í farloyvi.

Eitt starv á Familjudeildini frá 1. mars 2004 til 1. okt. 2004 vegna lestrarfarloyvi. Tann, sum settur verður í avloysarastarvið, skal starvast í skiftandi vaktum á Familjuheiminum, har 9 fólk eru í starvi, øll við viðkomandi útbúgving.

Endamálið við arbeiðinum á Familjudeildini er, at foreldrini verða styrkt og stuðlað í tí at vera foreldur, soleiðis at familjan kann virka betur sum ein heild. Eisini er endamálið at fáa greiði á, hvørjar styrkir og hvørjar trupulleikar familjan hevur, og í hesum sambandi meta um, hvat slag av stuðli er best og mest viðkomandi at veita familjuni framyvir. Tann, sum settur verður í avloysarastarvið, skal byrja 1. mars, ella so skjótt tilber.

Eitt starv á Barna- og ungdómsdeildini frá 1. apríl 2004 vegna barnsburðarfarloyvi. Tann, sum settur verður í avloysarastarvið, skal starvast í skiftandi vaktum á Barna- og ungdómsdeildini, har tað er pláss fyri 6 børnum í aldrinum 12–18 ár. Harumframt er eitt bráðfeingispláss.

Hevur tú viðkomandi útbúgving og hug at royna teg í hesum størvum, so send umsókn sum skjótast **til Føroya Barnaheim, Pedda við Steingøtu 10, 100 Tórshavn.**

Er eitt hvørt tú ynskir at frætta nærri um, so ber til at ringja í vanligari arbeiðstíð á tlf. 212320 og spyrja eftir Hallbjørg Lamhauge, deildarleiðara á Familjudeildini, ella Djóna N. Joensen, deildarleiðara á Barna- og Ungdómsdeildini.

Umsóknir við prógv o.ø. skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 20. februar 2004.

**Føroya Barnaheim**

*Leikhúsið Gríma*

framførir

# *Føroyingasøgu*

***Leikur fyri øll***

Leikstjórn Ria Tórgarð

á Meiarínum

| | |
|---|---|
| **leygardagin** | **7. februar kl. 16.00** |
| **sunnudagin** | **8. februar kl. 16.00** |

Atgongumerki: á kr. 80,-

fáast á Kunningarstovuni ella við dyrnar 1 tíma undan sýning.